

Sunnukvøldið kl. 21.45

Rýmingin

Tað er Michail Welitschkow, rithøvundi úr Bulgaria, sum hevur skrivað handritið til danska sjónvarpsleikin »Rýmingin«. Í innihaldi snýr filmurin seg um tvær eldri kvinnur, sum báðar hava ofrað seg fyri familjum teirra. Tær eru samdar um, at hava tað gott á gomlum døgum teirra. Kvinnurnar flyta saman á eitt kamar á heilsubótaheimi. Tær vilja hvør sær sýna familjuni, at alt gongst væl.

Royndir teirra at skapa sær nýggja tilveru eru mangan skemtiligar og tað skortar ikki upp á uppfinningarsemið.

Kortini hava báðar trupulleikar, at gevast við at hugsa um familjurnar og vanliga gerandislívið, sum tær hava sagt seg úr.

Henning Ørnbak hevur stjórnað og kvinnurnar í leikinum spæla, Tove Mäes og Kirsten Rolffes.

sjónvarp

Leygardagin 18. august

19.30 *Tom Sawyer og Huckleberry Finn 3* (13)
22.15 *Spenningur í Singapore*
21.05 *Síðstu buskmenninir*
21.30 *Olympiadusøgan 2* (3)
21.50 *Ein dreymur gerst veruleiki 3* (5)
22.35 *Bob Marley*
23.05 *Liðugt*

Sunnudagin 19. august

15.00 *Tónleikur mær dámar*
15.45 *Gudstænasta*
19.30 *I Columbaione*
20.15 *Ivan Rebroff*
21.45 *Rýmingin*
22.50 *Andakt*
22.55 *Liðugt*

Ú. F.

Leygardagin 18.

09.30 **Vikingabrøgd**
13. partur
11.01 **Bombibitt og eg**
11. partur.
13.01 **Barnaútvarpið**
13.40 **Vikingabrøgd**
14. partur.
18.40 **Ítróttatiðindi**
19.00 **V4-dráttur**
19.05 **Myndir úr London**
Seinni partur av ferðafrásøgn hjá Niels Juel Arge úr London.
19.40 **Leygarkvøldsløg**
Ove Olsen leggur til rættis.
20.05 **Dagsins poppur**
Leif Láadal leggur til rættis.

Sunnudagin 19.

14.00 **Veðurtiðindi og tíðindi**
14.10 **Kvøðuljómar**
15.15 **Ítróttur**
17.00 **Guðstænasta úr Skála Kirkju.**
Petur Petersen prestur prædikar.
18.00 **Tónleikur**
18.30 **Veðurtiðindi og tíðindi**
18.40 **Ítróttatiðindi**
18.50 **Tiðindi á grønlendskum**
19.05 **Veðurtiðindi**

Mánadagin 20.

09.25 **Myndir úr London**
11.01 **Bombibitt og eg**
12. partur.
19.00 **Vikingabrøgd**
15. partur av ritgerð eftir Berthil Wahlquist, sum Oskar Hermansson týðir.
19.30 **Rockredaksjónin**
Jákup Magnussen leggur til rættis.

Leygarkvøldið kl. 20.15

Spenningur í Singapore

Forvitni og tørv fyri pengum, fær Frank Buck at hitta Markoff, greiva, sum hevur boðið Frank hópin av peningi, um hann kann skaffa ein svartan pantara. Markoff sigur Frank Buck, at hann framførir í eini varité, og at hann noyðist at fara avstað um fáar dagar. Frank átekur sær uppgávuna. Samstundis er hann varur við, at ein gimsteinatjóvur er millum ríka amerikfólkið, sum búgva á Raffles hotel.

Frank og hjálpari hansara fara kortini avstað, at finna svarta pantarin.





Leygarkvøldið kl. 21.50

Ein dreymur gerst veruleiki

Tá olympisku luttakararnir úr Amerika koma til Gibraltar, fáa teir fjarrit frá Dr. Sloane, har hann sigur, at ferðaagentur teirra hevur upplýst skeivan dag viðvíkjandi teirra kappingardøgum í olympiaduni. Hetta førir viðsær, at ferðabólkurin noyðist at broyta kós í skundi. Farið verður um Italiu til Grikkaland, har teir koma fram í øllum góðum, júst sum teir skulu á vøllin.